TJÓÐVELDI

## Frá Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag

**Árligi aðalfundurin verður týsdagin 18. mars kl.19.30 í hølunum hjá Starvsmanna-felagnum, J.H. Schrøtersgøta 9. Dagskrá sambært lógum felagsins.**

***Nevndin***

MASKINMEISTARAFELAGIÐ

## Aðalfundur

Maskinmeistarafelagið hevur ársaðalfund

**leygardagin 8. mars kl. 14**

á Hotel Hafnia.

Skrá sambært lógini.

Petur Zachariassen, formaður í Útbúgvingarráðnum fyri sjóvinnuútbúgvingar heldur fyrilestur um framtíðar maskinmeistarútbúgving.

Aftaná fundin verður høvi at fáa smyrjibreyð og øl/sodavatn.

**Nevndin**

## FA. GRAVSTEINAR




*Opið: mánadag - fríggjadag 9⁰⁰-17⁰⁰*
*annars sambært avtalu.*

*Nýggj vøruskrá fæst!*

Sjónband - 31 77 74



TVØROYRAR KOMMUNA

## SVIMJIHØLLIN

Frá 16. mars 2008 er svimjihylurin á Tvøroyri opin soleiðis:

**Týsdag & tórsdag**
kl. 16.00 til 19.00 – Børn og vaksin

**Fríggjadag**
kl. 17.00 til 20.00 – Børn og vaksin

**Leygardag**
kl. 13.00 til 14.00 – Kvinnur
kl. 14.00 til 17.00 – Børn og vaksin

**Sunnudag - ókeypis**
kl. 8.30 til 10.30

Kostnaðurin er kr. 15,- fyri vaksin og kr. 5,- fyri børn. Sunnudagin er ókeypis.

Opið er eisini í skúlafrítíðini.

Svimjihøllin hevur tlf. 372266.

## KUNNGERÐ

**um framløgu av broytingaruppskoti í býarskipan og byggisamtykt fyri Leirvíkar Kommunu.**

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 við seinri broytingum hevur kommunustýrið á bygdarráðsfundi tann 3. mars 2008 samtykt, at gera broyting í býarskipanini og byggisamtyktini fyri Leirvíkar Kommunu.

Broytingin er løgd fram til almenna eftirskoðan í vanligu upplatingartíðum frá 4. mars til 28. mars 2008.

**Broytingin fevnir um:**
Økið ið er millum Brúsá og Garðsveg, og millum Bygdarhúsið og friðaða økið við Garð. Økið verður broytt til Almen endamál E .

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu skrivliga verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 5. juni 2008.

LEIRVÍKAR KOMMUNA

**Leirvíkar Kommuna**
4. mars 2008

Heilsuskúli Føroya

## Upptøka til Heilsuhjálpara á

## HEILSUSKÚLA FØROYA

Umsóknarfreistin er 15. mars 2008 kl. 15:00

**HEILSUHJÁLPARI:**
Endamálið við heilsuhjálparaútbúgvingini er, at næmingurin gerst førur fyri sjálvstøðugt, í samstarvi við onnur og við virðing fyri borgaranum, at røkja grundleggjandi stuðuls-, røktar- og umsorganarupp-gávur, at geva borgaranum persónliga og handaliga hjálp til dagligu lívsførslu sína og hjálpa til at vera virkin, so borgarin fær fullnýtt lívstilfeingi sítt.

Útbúgvingin skal harumframt geva næminginum førleika til at halda fram í heilsurøktaraútbúgvingini. Heilsuhjálparaútbúgvingin tekur 15 mánaðir og byrjar í august 2008.

**Upptøkutreytir til heilsuhjálpara:**
9. flokk + eitt ára arbeiðsroyndir, ella 10. flokk.
Útbúgvingin tekur 1 ár og 3 mánaðir.
Starvsvenjingin er á ellisheimum, sambýlum og í heimatænastuni.

**Fíggjarumstøður:** Útbúgvingarstuðul fæst undir út-búgvingini.

**Umsóknarbløð** og nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Heilsuskúlan, tlf. nr. 36 38 50.

Umsóknarbløð kunna eisini takast niður av heimasíðuni hjá mentamálaráðnum www.mmr.fo

**Umsókn** og váttað avrit av prógvum o.ø. skulu sendast til

*Heilsuskúla Føroya*
*Kongabrekkan 14*
*FO-800 Tvøroyri*
*Viðmerk: Umsókn*



## VW GOLF 2.0 TDI

VW Golf 2.0 TDI (diesel 140 HK) árg. 9/2006, km 30.000, til sølu um hóskandi boð fæst. Bilurin er ein sportline við sera nógvari útgerð og kostaði nýggjur kr. 355.000,-

Prís uppskot kr. 270.000,-

**Tlf. 283310**